# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 14. desember 2015, kl. $17^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Hilbert Elisson heitti á bygdarráðið um at loyva at seta eitt nýtt mál á skránna: Val av nýggjum limum í Teknisku nevnd. Áheitan varð gingin á møti, og málið verður sett á skrá sum mál 156.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 155**
Uppskot til almennar fundardagar fyri 2016
J.nr. 00.22.02-S02-1-13

Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælir til at áseta almennu fundardagarnar hjá Vestmanna Bygdarráði fyri 2016 til hesar:

| | |
|---|---|
| 27. januar | 31. august |
| 24. februar | 28. september |
| 30. mars | 26. oktober |
| 27. apríl | 9. november |
| 25. mai | 23. november |
| 22. juni | 14. desember |

Fundirnir byrja vanliga kl. $19^{00}$.

**Viðv. 155**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 156**
Hilbert Elisson boðaði frá, at hann ynskir at taka seg úr Teknisku nevnd. Hann heitti á bygdarráðið um at loyva hesum og at velja nevndina av nýggjum.

**Viðv. 156**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, spurdi, um bygdarráðið tók undir við, at Hilbert Elisson fer úr Teknisku nevnd. Hesum tók eitt samt bygdarráð undir við.

Eftirfylgjandi spurdi Pauli T. Petersen, borgarstjóri, um Herit Magnussen og John Zachariassen ynsktu at halda áfram sum nevndarlimir í Teknisku nevnd. Tað ynsktu bæði.
Eitt samt bygdarráð tók undir við hesum.

Síðani bað Pauli T. Petersen, borgarstjóri, um uppskot til nýggjan lim í Teknisku nevnd í staðin fyri Hilbert Elisson.
Durita á Heygum bjóðaði seg fram til at taka sæti í nevndini.
Eitt samt bygdarráð tók undir við, at Durita á Heygum tekur sæti í Teknisku nevnd.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson Herit Magnussen

Durita á Heygum Malan Stórá